# Stórir veðrar á Toftum

**Súni í Hjøllum hevur flett tríggjar veturgamlar veðrar í heyst, og miðalvektin var ikki minni enn 99 pund**

HEYST
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara í Suðuroy, at veðrar kunnu vera stórir – og ógvuliga stórir viðhvørt.

Størsti veðrurin, sum vit vita um er flettur í Porkeri, vigaði heili 130 pund. Hesin mundi tó í minsta lagi vera einar tveir vetrar gamal.

Á Toftum hevur Súni í Hjøllum í heyst flett tríggjar veturgamlar veðrar, og miðalvektin var heili 99 pund.

So, hetta hava alt verið ordiligir "oksar", um man kann siga tað so.

Størsti veðurin, sum sæst á myndini saman við eigaranum, vigaði heili 106 pund. Hinir báðir vigaðu ávikavist 97 og 94 pund.

- Men hetta er kortini ikki met hjá okkum. Í fjør vigaði besti veðurin 110 pund, og í 2003 108 pund, sigur Súni í Hjøllum í stuttari viðmerking.

Toftamaðurin er tó sera væl nøgdur við vektina í heyst.

Súni í Hjøllum eigur bróðir í Suðuroy, Óla í Hjøllum.

Vit hava ikki spurt hann, um veðrarnir hjá honum kanska hava "skyldfólk" í Suðuroy, men tað er ikki heilt óhugsandi.

So, hvørt veit, um veðrarnir hjá Súna á Toftum ikki eru úr góðum bergi brotnir, sum vit plaga at taka til.





*Hesin veðrurin vigaði 106 pund, og í fjør vigaði hin besti 110 pund. So, hetta eru ordiligir »oksar«, má sigast*

## VEÐRIÐ




**Veðrið í kvøld**
Útnyrðingur, 12 m/s. Ælaveður. Hitin um 3 stig




**Veðrið mikudagin**
Norðan og landnyrðingur, 7 m/s. Fyrrapartin ælaveður, seinnapartin skýggjað og á kvøldið klárt og turt. Hitin millum 3 og 5 stig




**Veðrið hósdagin**
Landnyrðingur, 8 til 10 m/s. Turt allan dagin, og hitin 5 stig.

**Veðrið fríggjadagin**
Útnyrðingur 6 m/s. Skýggjað og turt. Hitin 3 stig.

**Veðrið leygardagin – Alla halganadag**
Útsynningur, 15 m/s. Regn. Hitin um 8 stig

**Veðrið sunnudagin**
Útsynningur-vestan, 5 m/s. Skýggjað og turt. Hitin 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 8 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 22 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ





**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst, 990 hPa norðan fyri Hetland ferðast í ein landsynning-sunnan, og køld luft við kava og ælaveðri streyma framvegis yvir oyggjarnar úr útnyrðingi. Eitt lágtrýst tekur seg upp við Danmarkarsundið og ferðast í nátt úr útsynningspartinum av Íslandi og í ein landsynning móti Írlandi, her tað dýpist til 995 hPa.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/10 kl. 06⁰⁰ – 27/10 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 15,0 mm – mált frá 18/10 kl. 06⁰⁰ – 19/10 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 160 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 17. oktober | Mánin næstur jørðini |
| 21. oktober | Seinna kvarter |
| 28. oktober | Tendring |
| 2. november | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. okt | 4:53 | 17:14 | 3:53 | 16:14 | 4:08 | 16:29 | 6:53 | 19:14 | 7:53 | 20:14 | 3:08 | 15:29 | 2:08 | 14:29 | 5:08 | 17:29 | 6:08 | 18:29 | 4:38 | 16:59 | 5:53 | 18:14 |
| 28. okt | 5:35 | 17:57 | 4:35 | 16:57 | 4:50 | 17:12 | 7:35 | 19:57 | 8:35 | 20:57 | 3:50 | 16:12 | 2:50 | 15:12 | 5:50 | 18:12 | 6:50 | 19:12 | 5:20 | 17:42 | 6:35 | 18:57 |
| 29. okt | 6:20 | 18:43 | 5:20 | 17:43 | 5:35 | 17:58 | 8:20 | 20:43 | 9:20 | 21:43 | 4:35 | 16:58 | 3:35 | 15:58 | 6:35 | 18:58 | 7:35 | 19:58 | 6:05 | 18:28 | 7:20 | 19:43 |
| 30. okt | 7:07 | 19:31 | 6:07 | 18:31 | 6:22 | 18:46 | 9:07 | 21:31 | 10:07 | 22:31 | 5:22 | 17:46 | 4:22 | 16:46 | 7:22 | 19:46 | 8:22 | 20:46 | 6:52 | 19:16 | 8:07 | 20:31 |
| 31. okt | 7:55 | 20:20 | 6:55 | 19:20 | 7:10 | 19:35 | 9:55 | 22:20 | 10:55 | 23:20 | 6:10 | 18:35 | 5:10 | 17:35 | 8:10 | 20:35 | 9:10 | 21:35 | 7:40 | 20:05 | 8:55 | 21:20 |

Alt um harmonikur



www.simme.eu

